Kappingarárið 2021

12. september



Dagsins dystarbólt letur:

# Jóhan á Ørg

Leikskrá nr. 13

# LEIKARIN HESAFERÐ

**Stovnað:** 6. novembur 2007

**Heimavallir:**
Dungasandur í Sørvági
Valloyran í Sandavági

**Postadressa:**
Dungasandur 4, Sørvágur

**Telefon:** 590707

**Telefax:** 333550

**T-postur:**
07vestur@07vestur.fo

**Heimasíða:** www.07vestur.fo

**Formaður:**
Jón Nordendal

**Næstformaður**
Jens Kristian Haraldsen

**Skrivari:**
Finnbogi Niclasen

**Peningarøkil:**
Ingibjørn Johannesen

**Nevndarlimir:**
Egil Petersen
Eyðvør Petersen
Ove Heinesen
Rógvi Jacobsen

**Ábyrgd:**
Fróði Poulsen

**Blaðbólkur:**
Fróði Poulsen
Ingolf S. Olsen
Jóanis Albert Nielsen

**Uppseting:** Regin Davidsen

Navn: **Dánial Pauli Lervig**

Føddur: **26-04-1991**

Hædd: **182,5 cm**

Vekt: 78 **kg**

Pláss á vøllinum: **Vinstri miðverji/bakkur**

Besti matur: **Ræstur fiskur**

Heimsins besti fótbóltspælari er:
**Cristiano Ronaldo**

Onnur feløg tú hevur leikt við: **KÍ, Víkingur og HB**

Hvør er tann stuttligi á liðnum: **Uttan iva Høgni!**

Hvør er pressarin á liðnum: **Teitur Olsen**

Hvør á liðnum brúkar mest tíð frammanfyri speglinum: **100% Silas!**

Hvør er besti teknikari á liðnum: **Martin Heiberg**

Besti tónleikabólkur: **Kygo**

Besti filmur/seria: **Breaking Bad**





# UPPTAKTIN

*V/ Jarnhold Nattestad*

Einki er longur í at ivast: 07 Vestur hevur tikið stór stig fram á leið seinastu mánaðarnar. Ella neyvari, síðan 0-9 stórtapið á heimavølli í mei, í 10 umfarið, móti KÍ. Vit hava nú spælt 10 dystir afturat, 20 í alt, og áhugavert er at samanbera fyrstu 10 og seinnu 10 dystirnar:

Fyrstu 10: 7 stig, 12 vunnin mál, 38 mál ímóti
Seinnu 10: 14 stig, 14 vunnin mál, 19 mál ímóti

Vit hava skotið á leið líka nógv mál, men tað er í verjupartinum at stóri munurin er, har vit hava latið bert helvtina so nógv mál inn. Og úrslitið er at vit hava fingið júst tvífalt so nógv stig hesar seinnu 10 dystirnar. Og so verður tað sjálvsagt spennandi, tí við 14 stigum í 10 dystir, hava vit hála okkum, ikki bara 1 stig frá niðurflyting, sum støðan var tá, men upp á 6. pláss, 8 stig frá niðurflyting, 2 stig frammanfyri B68 á 7. og 5 frammanfyri EB/Streym á 8. plássi.

Eins og vit, hava B36 hava í roynd og veru staðið seg væl í ár, tó at vit ikki kenna teir egnu vónir til árið, og hvussu teir síggja uppá úrtøkuna. Teir liggja á 3. plássi, 1 stig frammanfyri HB, sum tó hevur tveir dystir færri. Við einum rættiliga ungum liðið (miðalaldurin á teimum 15, sum hava spælt meira enn helvtina av dystunum er undir 24 ár), og einum, í føroyskum mansfótbólti, óroyndum venjara, hava teir nærum tryggja sær støðuna í topp 4, 3 stig frammanfyri NSÍ, sum hevur spælt 1 dyst fleiri.

Teir hava nakrar góðar og royndar leikarar, millum aðrar Andrias Eriksen, Benjamin Heinesen, Alex Mellemgaard og Sebastian Pingel, sum saman við nøkrum nýggjum donskum leikarum og nýkomna Uros Stojanov, ger B36 til sera sterka mótstøðu, og ikki bara fyri liðini á niðaru hálvu.

Sum áður sagt, hava vit tikið okkum nógv fram seinastu mánaðirnar, og seinastu fýra dystirnar hevur úrtøkan eisini verið rættiliga góð, vit vunnið tríggjar og spælt ein javnan, fingið 10 av 12 møguligum stigum. Alt ímóti liðunum niðanfyri okkum. Stóri og spennandi spurningurin er so: ja, vit hava flutt okkum, tað er heilt greitt, men hvussu nógv, og er tað nokk til at spæla upp móti liðunum í ovaru hálvu?

Seinasti landskappingardystur okkara móti B36 var 1-1 dysturin í 11. umfarið, og 1. dysturin eftir stórtapið móti KÍ. Tað varð eisini seinasti dysturin hjá Heðini Askham sum venjara. Vit spældu ein ok dyst, og tá Sølvi skoraði í 70. minutti, høvdu havnarmenn ikki meira at bjóða uppá. Í summarsteðginum spældu vit eisini móti B36, ein venjingardyst í Gundadali. Tíðliga í 2. hálvleiki javnaði John Fagerstøm við einum super lobbið langt úti frá, næstan móti síðulinjuni, og tað, ið restaði í, vóru vit omaná fyri ein stóra part.

Sunnudagin kl. 15 taka vit so ímóti árstalsfelagnum úr Havn (og ja, 07 Vestur er eisini eitt sokallað árstalsfelag, hóast tað sjálvdan verður nýtt um okkum), fyri seinastu ferð í ár. Sjálvsálitið eigur at vera gott hjá okkum, og vit hava sanniliga nakað at hava tað í. Vit taptu fyrsta dystin í ár á heimavølli, 0-2, móti júst B36. Nú er løtan og møguleikin, og alt liggur til rættis fyri, at vit kunnu vísa hvussu langt vit hava tikið okkum fram á leið.

Koyrið á 07 Vestur

# VESTMEK

MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA



**Vestmek** bjóðar góða góðsku
fyri góðan prís





VESTMEK

MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA

Bryggjan 17    380 Sørvágur    Faroe Isands    www.vestmek.fo

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

sendistovan

Sand- og skervsølan
í Sandavági

Alt innan:
- tilfar
- veitan
- levering

Finn meg á
facebook

Tlf: 213577

Lastvognskoyring v/ Erhard Dam

RISIN
BÓKHALDSVIRKI

TEL. 58 43 89

# EG YNSKI MÆR EITT VÁGALIÐ

***Stundin má vera komin til, at fótbólturin í Vágum verður lagdur saman í eitt felag, heldur greinskrivarin. Ein náttúrlig fylgja av tíð er eisini ein navnabroyting, tí felagið má hava eitt navn, sum Vágar eru partur av, um alt fólkið í oynni skal taka tað til sín sum sín felags fótbóltssamleika, heldur hann***

**Ingolf S. Olsen hugleiðir**

Gamalt var ikki at kanna sær bitan, fyrr enn hann var svølgdur. Annars kann vera so skjótt, at ein setur í hálsin. So tað fari eg ikki at gera.

Men stigatalvan í Betri Deildini ber tó boð um, at 07 Vestur í hvussu er í løtuni er í tryggari frástøðu frá niðurflytingarstrikuni, og tí loyvi eg mær hóast alt at spæla mær við dreymin um, at okkara lið aftur skal kappast ímillum tey bestu næsta kappingarár.

Og fyri hvørt ár, tað eydnast 07 Vestur at halda seg á rókini, gerst grundvøllurin tryggari. Felagið og liðið sleppa at mennast og styrkja sína støðu, og so líðandi fer liðið at roknast ímillum tey, ið hava eitt sjálvsagt sæti í bestu deildini.

Grundarlag er fyri tí. Í seinastu leikskrá vísti Jón Nordendal, formaður í 07 Vestur, til dømis á, at fólkagrundarlagið undir 07 Vestur er tað sama sum hjá Víkingi – eitt lið, har vandin fyri niðurflyting sjáldan hevur verið veruligur; heldur hevur tað verið ein spurningur um, hvørjum málmi heiðursmerkini skuldu vera úr.

### Samanlegging

Tað eru tó viðurskifti, sum eg kundi ynskt mær betri og tryggari á tí grundvøllinum, ið byggjast skal á. Fólkagrundarlagið kundi til dømis verið væl størri enn tað hjá Víkingi. Tað manglar bara at fáa MB við.

Og tað er mítt ynski, at øll segl verða sett at røkka einari fullkomnari samanlegging av fótbóltinum í Vágum.

Lokal kapping er ofta bara góð og stimbrandi, og eg dugi eisini at síggja



vandarnir við, at fótbólturin verður savnaður í færri feløg. Serliga tá tað snýr seg um børnini og teir yngru spælararnar.

Eg skal eisini viðganga, at eg sjálvur við árunum havi broytt meining, tá tað ræður um bestu deildina, tí eg helt tað í síni tíð vera stórt spell, bæði tá tað bleiv vanligt hjá spælarum at flyta ímillum feløg, og seinni tá feløg blivu løgd saman.

Men eg haldi, at vit, sum frá er liðið, mugu viðurkenna, at kappingin í bestu fórbóltsdeildini hjá monnum, er vorðin av slíkum slag, at geografiska grundarlagið – og fólkagrundarlagið – undir hvørjum einstøkum felag má hava eina ávísa stødd. Annars verður gongdin, sum vit kenna tað alt ov nógva aðrastaðni frá úti í heimi, at tað bert verður eitt superlið í toppinum, sum vinnur alt, ella í besta føri

*(framhald á síðu 18)*




BANKNORDIK

**Heili 85% av føroyingum hava ikki nóg gott innlit í sína pensjón og sínar lívstryggingar. Ert tú ein av hesum?**

Kanna tína støðu á **banknordik.fo/pensjon**

*Ráðgeving, sum øll skilja*

EM Asfalt

Tel. 22 51 10 & 22 47 16

jn.fo

# VIÐLÌKAHALDSFRÌTT











## PLASTKLÆDNING OG BJÀLVING

Vit umboða dygdar húsaklæðningin úr plast.
Týski klæðningurin er sera væl egnaður til føroyska veðurlagið.

10 ymiskir litir eru at velja í,
og horn og listar fáast í somu litum.

Brettini eru heili 6 metur til longdar.

**SANDAVÁGS TIMBURHANDIL**

Hillingatangi - 360 Sandavágur - Tlf. 332700 - www.timbur.fo

# Bilasølan

STUÐLAR



**Flott snið og týsk góðska, tá hon er allarbest.**


Sørvágs kommuna
stuðlar 07 Vestur
Varðagøta 8 • FO-380 Sørvágur • www.sorvag.fo


Vága kommuna
stuðlar 07 Vestur
www.vaga.fo
VÁGA KOMMUNA

| Nr. | Leikari | Aldur | Dystir | Mál | Minutir |
|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Silas Eyðsteinsson | 23 | 20 | - | 1800 |
| 9. | Martin Heiberg Petterson | 24 | 20 | 3 | 1757 |
| 23. | Jóannis á Steig | 24 | 19 | 1 | 1702 |
| 22. | Predrag Jeremic | 33 | 18 | 2 | 1373 |
| 4. | Dann Fróðason | 21 | 17 | 1 | 1468 |
| 8. | Martin Tausen | 31 | 17 | 2 | 1161 |
| 21. | Teitur Olsen | 23 | 17 | 1 | 1259 |
| 70. | Albert Theis Nielsen | 21 | 16 | - | 635 |
| 14. | Ragnar Weihe | 20 | 15 | 1 | 713 |
| 3. | Dánjal Pauli Lervig | 30 | 14 | - | 1079 |
| 24. | Sølvi Egilsson | 26 | 13 | 1 | 560 |
| 7. | Høgni E. Nielsen | 24 | 12 | 2 | 786 |
| 15. | Asbjørn Heðinsson | 20 | 11 | - | 888 |
| 11. | Zoran Vojovic | 35 | 10 | 1 | 664 |
| 2. | Eiler Fróðason | 18 | 9 | 2 | 564 |
| 6. | Kevin Jablinski | 25 | 8 | 1 | 720 |
| 10. | Erling F. Myklebust | 24 | 8 | 1 | 616 |
| 20. | John Fagerström | 23 | 6 | 2 | 533 |
| 10. | Marius Hagen | 29 | 6 | - | 522 |
| 5. | Heine Mortensen | 30 | 6 | 1 | 409 |
| 6. | Tór-Ingar Akselsen | 40 | 4 | 1 | 323 |
| 19. | Janus Samuelsen | 22 | 4 | - | 48 |
| 12. | Marjus E. Nielsen | 18 | 3 | - | 33 |
| 17. | Ingi Joensen | 18 | 2 | - | 9 |
| 16. | Ari í H. Petersen | 18 | - | - | 0 |
| 18. | Brandur Heinesen | 19 | - | - | 0 |
| | Sámuel Eyðsteinsson | 20 | - | - | 0 |
| | Venjari: Magnus Powell | | | | |

| Leikari |
|---|
| Andrias Eriksen |
| Mattias Lamhauge |
| Ragnar Samuelsen |
| Bjarki Nielsen |
| Benjamin Heinesen |
| Mathias Thrane |
| Alex Mellemgaard |
| Lukas Enevoldsen |
| Martin Agnarsson |
| Andrass Johansen |
| Hannes Agnarsson |
| Magnus Jacobsen |
| Bjarni Petersen |
| Sebastian Pingel |
| Tobias Christensen |
| Hugin Samuelsen |
| Brian Jakobsen |
| Uros Stojanov |
| Bárður Olsen |
| Hákun Edmundsson |
| Andreas Thomsen |
| Jóhann Joensen |
| Símun Rógvi Hansen |
| Mattias Joensen |
| Venjari: Dan Brimsvík |

unicar.fo

BILÚTLEIGAN, OG EISINI UMVÆLA VIT SKAÐAR,
LAKKERA OG SKIFTA RÚTAR + 298 544000

# STIGATALVAN

| # | | Lið: | D | V | J | T | MF | MÍ | MM | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | | KÍ | 20 | 18 | 2 | 0 | 78 | 6 | 72 | 56 |
| 2 | | Víkingur | 20 | 13 | 5 | 2 | 41 | 19 | 22 | 44 |
| 3 | | B36 | 20 | 9 | 8 | 3 | 36 | 20 | 16 | 35 |
| 4 | | HB | 18 | 10 | 4 | 4 | 53 | 17 | 36 | 34 |
| 5 | | NSÍ | 21 | 9 | 5 | 7 | 37 | 30 | 7 | 32 |
| 6 | | 07 Vestur | 20 | 6 | 3 | 11 | 26 | 57 | -31 | 21 |
| 7 | | B68 | 20 | 5 | 4 | 11 | 24 | 49 | -25 | 19 |
| 8 | | EB/Streymur | 19 | 4 | 4 | 11 | 16 | 38 | -22 | 16 |
| 9 | | ÍF | 19 | 3 | 4 | 12 | 20 | 47 | -27 | 13 |
| 10 | | TB | 19 | 0 | 3 | 16 | 10 | 58 | -48 | 3 |



CARRO
carro.fo - 21 25 51

FAE VÁGA FLOGHAVN

Giljanes bussar koyra um alt landið




Tel. 21 98 99    giljanes@giljanes.fo


.fo
Vágaportalurin
Vágafólk lesa
Vágaportalin
.fo
Vágaportalurin


www.wt.fo


VisitVágar
part of
the Faroe Islands
www.visitvagar.fo
vagar@visitvagar.fo
Tel. (+298) 333455


FOSSÁ

FROZEN FISH LANDING

Hølcksmíð
v/Gerhard Hansen

Alt innan timburarbeiði

Tlf. 282710



**Neinbjørn Nattestad**
Bilverkstaður
**Tlf. 332727 | Fax. 333727**

MÚRARIN

V/ Kell E. Jensen
Kálvalíðvegur 10
370 Miðvág
tlf. 332779 og 222101
t-post: murarin@olivant.fo


BETONG RUNT ALT LANDIÐ
58 50 25 ella 31 50 60
Vit veita eisini vegleiðing í sambandi við betongsløg og styrki
Blandistøðin er góðkend av Norska Kontrollrådet
J&K BETONG


Sp/f Mykines
Bryggjan 17
FO-380 Sørvágur
Tel. +298 21 08 70
www.mykines.fo
mykines.fo
must see from sea

*(framhald av síðu 7)*

tvey-trý lið, sum eru í einum klassa fyri seg og hava nakað serligt at kappast um.

## Tænir øllum best

Stundin má vera komin, at tey bæði fótbóltsliðini í Vágum taka lógvatak, leggja saman og gera áskoðararnar í allari Vágoynni til sín tólvtamann.'

Eg ivist onga løtu í, at tað hevði tænt báðum pørtum, øllum fótbóltinum í oynni og felagslívinum rundan um hann.

Royndir eru áður gjørdar, sum kollsigldu eftir stutta livitíð – tað var ta tíðina, tá allur mansfótbólturin í oynni var savnaður í FS Vágum – og tó at eg ongantíð sjálvur havi verið organisatoriskt knýttur at ella aktivur í ítrótti í Vágum, um vit síggja burtur frá eitt sindur av bridgespæli, so havi eg hoyrt nógv um ósemjurnar, ið verið hava, alt tað, sum kanska bleiv gjørt skeivt og ikki riggaði og øll argumentini fyri og serliga ímóti samanlegging.

## Læra av feilum

Men júst tað, at kynstrið er roynt og miseydnast einaferð, og at tað hevur verið kjakast um hetta heita evni í nógv harrans ár, ger, at vit kenna snávingarsteinarnar.

Eg giti, vit øll eru rættiliga samd um, hvat ikki má henda – til dømis, at evnaríkir lokalir spælarar aftur verða sleptir upp á fjall til frama fyri fremmandar spælarar, og at barna- og ungdómsarbeiðið verður sentraliserað.

Tað snýr seg um ikki at gera teir feilir aftur, sum fyrr eru gjørdir í sambandi við samanleggingar her og aðrastaðni.

At fáa allan fótbóltin í oynni savnaðan í eitt felag, eigur sjálvsagt at merkjast reint ítróttarliga, tí spælaratilfeingið verður tað størri. Tað skal tó umsitast við stórum hegni, tí í Føroyum brúka sjálvt tey størstu feløgini ov nógvar fremmandar spælarar eftir mínum tykki. Tað eigur ikki at vera neyðugt, tá fólkagrundarlagið er stórt, um barna-og ungdómsarbeiðið verður gjørt, so tað ber góða frukt – sum tað verður gjørt nú í 07 í Vestur – og ein greið ætlan er fyri at menna og seta ungar spælarar við. Júst hetta er ein týðandi partur av dagsskránni hjá felagnum, legði Jón Nordendal eisini dent á í leikskránni seinast.

## Savna oynna

Men ein samanlegging fer eisini at savna oynna í aðrar mátar.

Lokali pengastuðulin fer til dømis at muna betri, tá tvey feløg ikki skulu stríðast um hann. Tað er galdandi fyri bæði privatan, vinnuligan og ikki minst kommunalan stuðul. Uttan at vita tað kann eg ímynda mær, at Vága Kommuna onkuntíð kemur í



tvístøður, tá pengar skulu brúkast upp á fótbóltin í kommununi, tí nú eru tvey feløg – MB og 07 Vestur – sum bæði í útgangsstøðinum væl saktans halda seg hava sama rætt til stuðul .

Størsta týdningin haldi eg tað tó hava, at vágafólk fara at standa saman um liðið sum ein maður. Tað fer sannlíkt eisini at hava ta dýrabaru synergieffekt við sær, at avrikini á vøllinum verða ávirkað rætta vegin.

## Nýtt navn

At fáa vágafólk at standa saman um besta fótbóltsliðið krevur tó, at tey kenna ein felags samleika í so máta, at tey øll identifisera seg við hetta liðið.

Og har er ein trupulleiki, sum eg haldi havi týdning, tó at hann kann tykjast lítil. Navnið spillir ongan, sigur orðafellið, men kortini haldi eg vissuliga ikki, at navnið 07 Vestur vendir sær serliga væl til vágafólk. Tað hevur ikki appell, sum tað so fínt verður sagt.

Nú hava fólk kanska vant seg við navnið, men Vágar er ikki neyðturviliga tað fyrsta ein hugsar um, tá ein hoyrir navnið 07 Vestur nevnt fyrstu ferð. Tað kann vera alt vestan fyri norður-suðurgangandi miðlinjuna í Føroyum.

Tá var FS Vágar eitt nógv beinraknari navn.

So tá ein samanlegging vónandi verður veruleiki um ikki ov langa tíð, haldi eg, at felagið eigur at fáa eitt nýtt navn – eitt navn, har Vágar eru við í, eitt navn, sum vendir sær til øll vágafólk.

Tí eg ynski mær eitt sterkt vágalið.


Øll hava rætt til góð
BARNAÁR
Drekka foreldur tíni ov illa?
Les meira á barnaár.fo
Modelmynd



Dalsbø Sp/f tlf. 228991





www.wt.fo



VESTPACK

VESTPACK

VESTPACK

## Handilsvirkið Niclasen

Timburhandil og byggibúð



Handilsvirkið Niclasen - Bakkavegur 26
Teldupostur: niclasen@niclasen.fo
TLF: 33 20 01 - FAX: 33 20 50

SMIÐJAN
TEL 30 88 88

Klima

MTHøjgaard

Movement that inspires

# Bílegg títt kort her

betri.fo/fjepparakort



# DYSTARSKRÁ 2021 BETRIDEILDIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | 07-03-2021 | 07 Vestur - B36 | 0-2 |
| 2. | 13-03-2021 | 07 Vestur - B68 | 3-2 |
| 3. | 20-03-2021 | ÍF - 07 Vestur | 3-1 |
| 4 | 28-04-2021 | 07 Vestur - EB/Streymur | 1-3 |
| 5. | 11-04-2021 | HB - 07 Vestur | 7-0 |
| 6. | 14-04-2021 | TB - 07 Vestur | 2-4 |
| 7. | 25-04-2021 | 07 Vestur - Víkingur | 2-4 |
| 8. | 02-05-2021 | 07 Vestur - KÍ | 0-5 |
| 9 | 08-05-2021 | NSÍ - 07 Vestur | 1-1 |
| 10. | 13-05-2021 | 07 Vestur - KÍ | 0-9 |
| 11. | 16-05-2021 | B36 - 07 Vestur | 1-1 |
| 12. | 02-10-2021 | B68 - 07 Vestur | |
| 13. | 15-06-2021 | 07 Vestur - ÍF | 1-0 |
| 14. | 20-06-2021 | Víkingur - 07 Vestur | 4-1 |
| 15. | 26-06-2021 | 07 Vestur - NSÍ | 2-4 |
| 16. | 27-07-2021 | 07 Vestur - EB/Streymur | 0-1 |
| 17. | 02-08-2021 | HB - 07 Vestur | 5-0 |
| 18. | 08-08-2021 | 07 Vestur - TB | 3-1 |
| 19. | 15-08-2021 | EB/Streymur - 07 Vestur | 1-3 |
| 20. | 22-08-2021 | ÍF - 07 Vestur | 1-2 |
| 21. | 28-08-2021 | 07 Vestur - B68 | 1-1 |
| 22. | 12-09-2021 | 07 Vestur - B36 | |
| 23. | 19-09-2021 | KÍ - 07 Vestur | |
| 24. | 26-09-2021 | 07 Vestur - Víkingur | |
| 25. | 17-10-2021 | NSÍ - 07 Vestur | |
| 26. | 24-10-2021 | 07 Vestur - HB | |
| 27. | 30-10-2021 | TB - 07 Vestur | |

# Familjubuffét

**Mán-Hós: Kl. 16.30 – 20.00**
**Fríggjadag: Kl. 16.30 – 21.00**
**Leygardag og Sunnudag: Kl. 13.00 – 21.00**



## Et, alt tú orkar, fyri 139,-

**(12 ár og eldri | Íroknað ísbuffét, sodavatn og kaffi/te)**

## Og títt barn etur fyri einans 70,-

**(11 ár og yngri, saman við foreldrum. Íroknað ísbuffét og sodavatn)**

## Bólkar (min. 10 fólk) 100,-

**(11 ár og yngri, saman við minst einum gjaldandi vaksnum. Íroknað ísbuffét og sodavatn)**

**Lat okkum ordna innkeypið og uppvaskið**

**www.pizza67.fo – Tel 356767**

Vit hava 3 sløg av pizza, salat, 4 sløg av dressingi, nachos, nýbakað hvítleyksbreyð, hønsagrýtu, nuggets, buffalo hønsaveingir, várrullur, chips, rís og 5 sløg av sodavatni, og omaná fáa tit 7 sløg av ísi og kaffi.


SANSIR
Heildar-
loysnir
frá
ArtiCon
HOTEL BRANDAN
ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo


Betong og timburarbeiði
Jóni Durhuus, byggimeistari • FO-350 Vestmanna • Tlf. 424473 – 223124

SPORT 24

KEYP EISINI OKKARA VØRUR
Á FØROYA FEITASTA NETHANDLI

**WWW.SKALKUR.FO**

ÓKEYPIS TIL DYRNAR
Í ØLLUM FØROYUM.

| SMS 31 95 12 | SALTANGARÁ 45 95 12 |

SPEKT
løggildir grannskoðarar

Staravegur 17
Postsmoga 3258
110 Tórshavn

Telefon 34 34 34
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo







BÓNUS®
STUÐLAR ÍTRÓTTINUM Í NÆRUMHVØRVINUM
mánadag til leygardag | 9-22


Föroya Bjór
NÚ
Í DÓS
Jolly
ORANGE
Jolly
ORANGE
FÆST KRING
LANDIÐ

HIDDEN**FJORD**

RAISED IN THE WILD

# Fyrsti alari í heiminum at gevast við flogflutningi

At flúgva vøru elvir til óneyðugt CO2-útlát.
Ov nógv CO2-útlát elvir til veðurlagsbroytingar.

